# ítróttur

Nr. 4 • fríggjadagur • 7. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Liverpool-treff á Eiði

Leygardagin 15. januar 2005 skipar felagið »Liverpool Føroyar«, sum er felag fyri fjepparar hjá enska felagnum Liverpool FC, fyri einum spennandi treffi á Eiði í samband við heimadystin móti Manchester United. Skráin fyri dagin er, frá klokkan 9 á morgni til middags verður spælt innandura í ítróttarhøllini á Eiði. Frá klokkan 12 verður fótbóltur á stórskíggja í EB-húsinum, og frá klokkan trý seinnapartin verður døgurði og kaffi á Hotel Eiði.

Tiltakið er bert fyri limir í felagnum, og meira kann lesast um tilmelding á heimasíðuni hjá felagnum – www.liverpool.fo.

# Steypafinalistar skulu finnast

**Um vikuskiftið verður árliga Mjølnir-kappingin hjá teimum eldru leikt í Klaksvík. Vinnararnir av kappingunum í meistaradeildini hjá bæði kvinnum og monnum tryggja sær samstundis sess í steypafinaluni**



*Flogbóltskappingin í Klaksvík um vikuskiftið fer at avgerða, hvørji lið skulu dystast við Mjølnir í steypafinaluni hjá bæði kvinnum og monnum*

*savnsmynd*

FLOGBÓLTUR

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*

Afturvendandi flogbóltskappingarnar, sum á hvørjum ári verða fyriskipaðar kring landið, hava fingið ein nýggjan dám, síðani Flogbóltssamband Føroya gjørdi av, at liðini, sum vunnu ávíkavíst FK-kappingina hjá Fleyr og Mjølnir-kappingina, samstundis vunnu sær sess í steypafinaluni.

### Mjølnir er í báðum finalunum

Tann fyrra av hesum báðum kappingum, nevnliga FK-kappingin hjá Fleyr, var spæld í Havn í heyst, og tá gjørdu klaksvíkingar bart í høvuðsstaðnum. Mjølnir vann nevnliga bæði meistaradeildina hjá kvinnum og hjá monnum, og tískil eru klaksvíkingar við í báðum steypafinalunum, sum verða leiktar á Hálsi tann 12. februar.

Nú skulu hinir finalistarnir so finnast, og tað verður gjørt í Klaksvík um vikiskiftið, tá ið árliga Mjølnirkappingin er á skránni.

Tey mongu liðini, ið skulu taka lut í Mjølnirkappingini, leggja til brots tíðliga leygarmorgunin og spælt verður allan dagin, bæði í KÍ-høllini og í fimleikahøllum í býnum. Sunnudagin verða so finalurnar á skránni.

Spælt verður í seks deildum, meistaradeild, 1. deild og 2. deild hjá bæði kvinnum og monnum.

# Stuttleikakapping fyri íslandsross

Leygardagin verður skipað fyri stuttleikakapping fyri íslandsross í høllini hjá Berg hestum við Oyggjarvegin. Kappingin byrjar seinnapartin leygardagin, og lagt verður til brots klokkan trý.

Kappast verður í fet, spakuligt tølt, trav og øltølt. Luttøkugjaldið er 50 krónur, og boðast kann frá luttøku á tlf. 316896, 226211 og 222906.

**tn**



*Tað er Leif Berg frá Berg hestum, ið skipar fyri stuttleikakappingini fyri íslandsross*

*savnsmynd*

## Real Madrid vann upp á 7 minuttir

Mikukvøldið vóru seinastu sjey minuttirnir av dystinum millum Real Madrid og Real Sociedad leiktir. Dysturin bleiv fyrr í vetur avblástur sjey minuttir fyri tíð, tí at ein bumbuhóttan var á leikvøllinum. Tá var støðan 0-0.

Spanska fótbóltssambandið avgjørdi, at teir seinastu sjey minuttirnir skuldu leikast mikukvøldið, og tá eydnaðist tað Real Madrid at fáa eitt mál. Brasilski framherjin Ronaldo bleiv koyrdur um koll, og fraklendingurin Zinedine Zidane settii brotssparkið í netið.

## Kapping um Schwarzer

Bæði Arsenal og Manchester United leita í hesum døgum eftir einum nýggjum málverja, og nú sigst, at feløgini bæði hava vent eyguni móti sama manni. Talan er um málverjan hjá Middlesborough, Mark Schwarzer. Avstralski málverjin sigur alment, at tað er ikki óhugsandi, at hann flytir til annað felag í hesum mánaðinum, og at talan allarhelst verður um eitt størri felag enn Middlesborugh.

## Pellegrino til Liverpool

Argentinski verjuleikarin Mauricio Pellegrino skrivaði mikudagin undir ein seks mánaðar langan sáttmála við enska felagið Liverpool FC, við møguleika fyri at longjan sáttmálan við einum ári.

Pellegrino kemur úr spanska felagnum Valencia, har hann hevur leikt síðani á sumri í 1999. Í Valencia leikti argentinski miðverjin undir núverandi Liverpool-venjaranum Rafael Benitez, og teir báðir fara nú sostatt aftur at samstarva.

## Chelsea vil hava Ferdinand

Manchester United fer eftir øllum at døma at bjóða landsliðsverjuleikaranum Rio Ferdinand ein nýggjan sáttmála í næstum, sum er verdur slakar 300 milliónir krónur. Talan er um helst størsta sáttmálan í søguni hjá enska felagnum, men tað kann verða, at tað ikki er nóg mikið. Tað ljóðar nevnliga, at Chelsea, sum jú hevur ein rættuliga stóran pengapung, stendur til reiðar við einum enn betri tilboði til Rio Ferdinand.

## Størsti lottovinningur í danskari søgu

Størsti lottovinningurin nakrantíð í danskari søgu gjørdist veruleiki mikukvøldið. Tá vann ein heppin dani nevnliga heilar 32,4 milliónir krónur á einum snarseðli, sum viðkomandi hevði keypt í einari lítlari sølubúð á Amager í Keypmannahavn.

Talan er um nógv tann størsta vinningin nakrantíð i Danmark, tí gamla metið var upp á 22 milliónir krónur.

**tn**